# Samanbering av hámarksstuðulsupphæddunum í Norðurlondum.

Endamálið við hesum skjali er, at ávísa teir munir, ið eru í lestrarstuðulsskipanunum í Norðurlondum í mun til upphæddir og samanseting av stuðulinum (studningur og lán). Endamálið er ikki at royna at lýsa, hvør stuðulsskipan er tann besta í Norðurlondum. Tað eru so nógv onnur viðurskifti, ið skulu takast við, um hetta skuldi verið gjørt, t.d. stuðulslongd, reglar viðv. lestrarvirkni, inntøkuávirkan á stuðulin, afturgjaldstreytir av lánum og aðrar ískoytisstuðulsskipanir, so sum ferðastuðul, barnastuðul og barnsburðarfarloyvisstuðul.

Talvurnar vísa hvussu stórur hámarksstuðulin (studningur og lán) er í teimum einstøku Norðurlondunum hjá einum ógiftum, útibúgvandi lesandi, ið er eldri enn 19 ár, ikki eigur børn og lesur við ein hægri lærustovn í heimlandinum. Tað framgongur av talvunum at í Føroyum, Danmark, Grønlandi og Finnlandi er tann størri parturin studningur (umleið 2/3). Í Íslandi er bert talan um lán og í Noreg, Svøríki og Álandi er tann minni parturin studningur (umleið 1/3).

**Mynd 1:** Talvan vísir hámarksstudnings- og lánsupphæddir í donskum kr. áðrenn skatt hjá einum lesandi í Norðurlondum.

**Mynd 2:** Talvan vísir talvu 1 gjørd til indextøl (DK = 100).

**Mynd 3:** Talvan vísir hámarksstudnings- og lánsupphæddir eftir skatt hjá einum lesandi í Norðurlondum gjørd til indextøl (DK = 100).

**Mynd 4:** Ein donsk kanning vísti, at í meðal arbeiða lesandi, ið eru eldri enn 19 ár, 535 tímar árliga við síðuna av lestrinum. Talvan vísir hámarksstudnings- og lánsupphæddir + løn eftir skatt hjá einum lesandi í Norðurlondum gjørd til indextøl (DK = 100). Lønin er sett til at vera tímalønin hjá einum lesandi, ið arbeiðir hjá tí almenna við 2 ára starvsaldri nevnda tímatal.

***Kelda**: Studni. Skjalið er gjørt við støði í ”Typiske maksimale støttebeløb i de nordiske lande 1983/84 – 2011/12”*

## Mynd 1

**Hámarksstudnings- og lánsupphæddir hjá einum lesandi í Norðurlondum í lestrarárinum 2011/2012 áðrenn skatt og umroknað til d.kr.**



**Mynd 2**

**Hámarksstudnings- og lánsupphæddir hjá einum lesandi í Norðurlondum í lestrarárinum 2011/2012 áðrenn skatt og umroknað til d.kr. (Index: DK=100)**




Dagur 12.12.2013

**Mynd 3**

**Hámarksstudnings- og lánsupphæddir hjá einum lesandi í Norðurlondum í lestrarárinum 2011/2012 eftir skatt og umroknað til d.kr. (Index: DK=100)**



**Mynd 4**

**Hámarksstuðulsupphæddir + meðalløn eftir skatt hjá einum lesandi í Norðurlondum í lestrarárinum 2011/2012 eftir skatt og umroknað til d.kr. (Index: DK=100)**

